


Gjaldstovan hevur ment skipanina **Bóking millum stovnar**.

Skipanin kemur í staðin fyri oyðubløðini EK 28.0, 29.0 og 30.0 **Bóking millum stovnar**.

Á BSL-portalinum er ein nýggj flís komin, sum eitur **BMS, Bóking millum stovnar**.




Tá ið trýst verður á flísina, verður komið inn á hesa myndina:




Í skipanini ber í høvuðsheitum til hjá stovnum at senda øðrum stovnum útgjøld ella krøv.

Sum í flest øllum skipanum hjá Gjaldstovuni, so skal vera ein skrásetari og ein leysgevari á hvørjum stovni. Skrásetarin kann skráseta útgjøld ella krøv, sum skulu sendast øðrum stovnum. Skrásetarin góðkennir eisini krøv, sum koma frá øðrum stovnum. Leysgevarin leysgevur krøvini, sum koma frá øðrum stovnum.

## Yvirlit

Í vinstru síðu er yvirlit, sum vísir, hvussu nógv krøv liggja, sum skulu góðkennast ella leysgevast.

Har ber eisini til at skráseta útgjøld og krøv.

Yvirlit er eisini yvir send krøv og útgjøld, innkomin krøv og inngjøld, skrásetingar, sum ikki eru bókaðar enn og útgjøld, sum eru send til leysgevingar.

Til seinast er kontuavrit, sum vísir yvirlit yvir útgjøld og krøv, sum eru send øðrum stovnum.

# Krav

## Skráset krav

Tá ið skrásetarin á einum stovni skal skráseta krav, sum ein annar stovnur skal rinda, verður trýst á




Skrásetarin fær so hesa myndina fram:




Fyrst skal ásetast, hvat skjalaslag talan er um.




Trý sløg eru at velja ímillum - bóking millum stovnar, lønarendurgjald og bóking millum internar grunnar.

Í næsta teigi skal ásetast, hvør móttakandi stovnurin er.



Síðan skal í næstu teigunum greiðast frá kravinum.




Skrivast skal eitt heiti fyri kravið, t.d. **Krav fyri jólahald**. Tíðarskeið skal ásetast, og upphædd skrivast.




Krøv kunnu vera afturvendandi. Tað ber eisini til at áseta her.




Verður trýst á **Ja**, so ber til at áseta, hvørjar mánaðir tað skal vera galdandi fyri.




Tað ber bara til at velja fram í tíð. Vit hava ásett tíðarskeiðið at vera september, og tí standa flugubein í september, oktober, november og desember. Skal tað ikki vera galdandi fyri allar hesar mánaðirnar, ber til at taka flugubein burtur.

Høvdu vit í staðin valt januar, so hevði borið til at valt millum allar mánaðirnar í árinum.



Kravið fyri jólahald er ikki afturvendandi, so vit broyta frá ja til nei og trýsta so á skráset niðast í høgra horni.




Myndin víðkast nú, og tað ber til at kontera.




Nú skal ásetast, hvussu kravið skal bókast. Í hesum døminum er tað Gjaldstovan, sum skrásetir eitt krav, sum ein annar stovnur skal rinda.

Tað fyrsta er at áseta stovnsnummarið í teigin **Stovnsnr.** Tað kann vera, at alt gjaldið ikki skal bókast á sama stað. Tað kann vera, at tað skal á ymisk stovnsnummur, støð, endamál ella annað. Um so er, so skal trýstast á **Nýggja linju** í gráa breddanum ovast.




Tá ið trýst er á **Goym broyting**, sæst samanlagda upphæddin. Í hesum førinum er hon 610,15 krónur.

Ansast má eftir, at upphæddin samsvarar við upprunaligu upphæddina. Samanlagt er hetta 100 krónur ov lágt, tí 510,15 krónur og 100 krónur er ikki samanlagt 710,15 krónur. Tað ber ikki til at senda kravið, fyrr enn upphæddirnar stemma.

Hevur skrásetarin gjørt okkurt skeivt og t.d. vil strika onkra linju aftur, so trýstir hann á kassan millum flugubeinið og tekstin. Tá ber til at biðja um at margfalda, strika og ymiskt annað.






Tað ber eisini til at kontera kravið á útgreining, stað, endamál, verkætlan og so víðari. Skal kravið á t.d. fleiri støð, so ber sjálvandi eisini til at leggja linjur afturat.

So er bara eftir at viðhefta skjal og avgreiða kravið.

Tá ið útgjaldarin trýstir á **Send**, fer kravið til stovnin, sum skal rinda.

## Góðkenn krav frá øðrum stovni

Skipanin er sett upp soleiðis, at á stovninum, sum skal rinda peningin, har skal skrásetarin fyrst góðkenna og kontera upphæddina. Síðan sendir skrásetarin tað til leysgevaran at leysgeva. Tá ið leysgevarin hevur gjørt tað, er kravið avgreitt.

Tá ið skrásetarin fær eitt krav at avgreiða, so sær hann tað á flísini á BSL-portalinum.




Tá ið skrásetarin er komin inn í skipanina, skal hann í vinstra bredda trýsta á **Góðkenn**.



So kemur henda myndin fram:


Krøv frá øðrum stovni

Go Actions

| Skjalaslag | Sender Org | Upphædd | Tekstur | Tíðarskeið | Søga |
|---|---|---|---|---|---|
| Bóking millum stovnar á StRk. 7110 og 7610 | Gjaldstovan | 700,00 | Jólahald | 09-19 | |
| Bóking millum stovnar á StRk. 7110 og 7610 | Gjaldstovan | 710,15 | Krav fyri jólahald | 09-19 | |

1 - 2

Tá skrásetarin hevur trýst á blýantin uttast vinstrumegin, ber til at áseta konteringina.


Kontering

Edit Nýggja linju

Sum (Upphædd)

| Tekstur | Upphædd | Stovnsnr. | Strk | Útgreining | Stað | Endamál | Verkætlan | Verkevni | Skrás. nr. | Artskonta | Táttur 10 | Táttur 11 |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Krav fyr... | 710,15 | | 7110 | 0000 | 0000 | 0000 | 0000 | 0000 | 00 | 0000 | 0000 | 0000 Ógreinað |

1 rows selected Total 1

Sum greitt frá omanfyri, kann hesin skrásetarin eisini leggja linjur afturat, so at upphæddin kann verða konterað á t.d. fleiri stovnsnummur ella fleiri støð.

Tá ið liðugt er konterað, verður trýst á **Goym broytingar** og síðan **Góðkenn**.

Kravið fer nú til leysgevaran, sum kann avgreiða tað, so tað verður útgoldið.

## Leysgev

Tá ið leysgevarin fær kravið at avgreiða, so sær hann tað á flísini á BSL-portalinum.




Tá ið leysgevarin er komin inn í skipanina, skal hann í vinstra bredda trýsta á **Leysgev**.



Leysgevarin fær hesa myndina fram, tá ið hann hevur trýst á **Leysgev**.



At leysgeva

Go Actions

| Vís skráseting | Skjalaslag | Avsendari | Amount | Samanlagt | Tekstur | Afturvendandi | Søga |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| | Bóking millum stovnar á StRk. 7110 og 7610 | Gjaldstovan | 710,15 | - | Endurgjald fyri jólahald | Nei | |

1 - 1

Verður trýst á sjóneykuna, sær leysgevarin fleiri upplýsingar og tey viðheftu skjølini.



Kontering

| Stovnur | Tekstur | Kontering | Bóking | Upphædd | Tíðarskeið |
|---|---|---|---|---|---|
| Mentamálaráðið | Endurgjald fyri jólahald | 103020.7110.0000.0000.0000.0000.0000.00.0000.0000.0000 | Debet | 510,15 | 09-19 |
| Mentamálaráðið | Endurgjald fyri jólahald | 145060.7110.0000.0000.0000.0000.0000.00.0000.0000.0000 | Debet | 200,00 | 09-19 |
| | | | | 710,15 | |

1 - 2

Viðheft skjøl

| Skjalaheiti | Vís skrásetingar |
|---|---|
| Skjal.docx | Tak niður |

1 - 1

Leysgevarin kann annaðhvørt avvísa ella leysgeva.




Avvísir hann, skal hann skriva viðmerking.




Er alt í lagi, so trýstir hann á **Leysgev**, og so fer gjaldið til tann stovnin, sum er ásettur at fáa tað.

## Útgjald

At skráseta og avgreiða útgjøld er meinlíkt. Einasti munur er, at á stovninum, sum sendir útgjaldið, eru tað bæði skrásetarin og leysgevarin, sum avgreiða útgjaldið. Tað skal skrásetast og leysgevast, áðrenn móttakandi stovnurin fær tað.

Á stovninum, sum fær peningin, skal skrásetarin áseta konteringina og góðkenna inngjaldið, og so er tað avgreitt.